# Fara nú at byggja raðhús í Runavík

**Húsini skulu vera klár at flyta onn í longu tíðliga næsta ár. Tað fer at hjálpa væl upp á íbúðartørvin í Runavík, sum er rættiliga stórur**

HÚSABYGGING
*Áki Bertholdsen*

Nú verður eitt stórt stig tikið fyri at hjálpa upp á íbúðarneyðina í Runavík.

Nú verða nevniliga ikki færri enn 12 raðhús bygd á Høgaleiti í Runavík. Húsini verða bygt í tveimum raðum við seks húsum í hvørjum raði.

Høgaleiti er mitt í Runavík, beint niðan av keiini og útsýnið er tað besta, ið hugsast kann.

Tað er byggifelagið HP-Hús í Rituvík, sum fer at byggja húsini.

Byggifelagið sigur, at húsini vera 94 fermetrar hvørt til støddar.

Øll loyvi eru fingin til vega og ætlanin er at fara undir byggingina so skjótt sum gjørligt. Ætlanin er at húsini verða liðugt at flyta inn í einaferð í longu tíðliga komandi summar.

Í løtuni verður arbeitt uppá at fáa tilboð til vega og at roknað prísir út, so enn veit felagið ikki, hvussu nógv húsini fara at kosta.

Men Byggifelagiðsigur, at húsini verða í øllum førum væl og virðiliga kappingarfør í prísi og teir lova eisini, at dygdin í húsunum verður tann rætta.



*Soleiðis fara tey 12 raðhúsini, sum nú verða bygt á Hagaleiti í Runavík, at síggja út. Húsini verða púra klár at flyta inn í, tá ið tey verða seld, men tað fer at bera til hjá fólki í ein vissan mun at gera broytingar eftir egnum ynski*

Tað verður "Inni" sum er sethúsasølan hjá Føroya Sparikassa, ið fer at selja húsini fyri HP-Hús.

Byggifelagið sigur, at húsini verða púra klár at flytainn í, tá ið tey verða seld, tvs, at har verður bæði gólv lagt í, málað, tapeserað og køkur settur upp.

Men sjálvsagt ber tað til hjá hvørjum einstøkum keypara at broyta húsini eftir egnum ynski og at fáa okkurt annað gólv, aðra køk, ella aðrar litir og aðrar hvítvørur, men kann sjálvsagt eisini broyta kostnaðin.

Byggifelagið upplýsir, at gongur tað væl við hesi byggingini, er ætlanin avgjørt at halda fram og at byggja fleiri raðhús av hesum slagi.

# Bíðilistin til grundstykki útflýggjaður peningastovnum

**Tórshavnar Kommuna hevur útflýggja Føroya Banka og Føroya Sparikassa bíðilistan við nøvnunum á teimum, sum hava søkt um grundstykki í Havn. Leivur Hansen vil hava málið fyri á Býráðsfundi í næstu viku**

ALMENT INNLIT
*Áki Bertholdsen*

Seinastu dagarnar eru tað nógv sum hava fingiðå óvæntað bræv frá Føroya Sparikassa og Føroya Banka.

Tað eru fólk, sum hava søkt Tórshavnar Kommunu um grundstykki, sum nú hava fingið bræv frá peningastovnunum.

Í brævinum bjóða peningastovnarnir teimum fígging, nú tey hava søkt um grundstykki og fara at byggja.

Hetta hevur ørkymlað tey, tí tey hava ikki biðið um fígging og tey vita heldur ikki, hvussu peningastovnarnir vita, at tey hava søkt um grundstykki.



### Útflýggjar bíðilistan

Summi av fólkunum á bíðilistanum hava vent sær til býráðslimir, m.a. til Leiv Hansen, tí tey undrast á, at peningastovnarnir hava fingið nøvnini á teimum, sum hava søkt um grundstykki.

Leivur Hansen, býráðslimur, heldur, at málið er so mikið álvarsligt, at hann vil hava málið fyri á næsta býráðsfundi, sum verður í næstu viku.

*Tórshavnar Kommuna hevur nú útflyggjað peningastovnum bíðilistan við nøvnum á teimum, sum hava søkt um grundstyyki. Í hesum føri hava peningastovnar grovliga misbrúkt lógina um alment innlit. í hvussu so er moralst, og Býráðið átti at havt noktað, heldur Leivur Hansen, býráðslimur*

Hann sigur, at tað er Býráðið sjálvt, sum hevur útflýggjað peningastovnunum listan við nøvnunum á teimum, sum hava søkt um grundstykki í Havn.

Hann sigur, at hann hevur spurt seg fyri hjá umsitingini hjá Býráðnum og har hevur hann fingið upplýst, at Føroya Banki og Føroya Sparikassi hava søkt Býráðið um alment innlit í bíðilistan til grundstykki.

Umsitingin í Býráðnum spurdi síðani sakførarar til ráðs og hjá teimum var eingin ivi um, at bíðilistin var almennur og at Býráðið tí ikki kundi noktað peningastovnunum á fáa hann. Sostatt vórðu bíðilistarnir útflyggjaðir peningastovnunum.

### Skuldi nokta

Leivur Hansen heldur, at hetta er grovliga at misbrúka lógina um alment innlit. Í hvussu so er moralskt.

– Eg haldi, at her er talan um privat viðurskifti og tað kann ikki bera til, at borgarar ikki skulu kunna samskifta við Býráðið um privat viðurskifti, uttan at stúra fyri, at tað skal verða almannakunngjørt.

Tí heldur hann, at Býráðið skuldi noktað at útflýggja bíðilsitan, hóast sakførarar høvdu sagt, at hann kom undir lógina um alment innlit.

– Býráðið átti ikki at havt útflyggja listan, fyrrenn tað var óreingiliga greitt, at Býráðið varð noytt til tað. Tvs, at onkur hægri myndugleiki skuldi fingið høvi at sagt sína hugsan um málið fyrst.

Eitt nú heldur Leivur Hansen, at hetta hevði verið eitt væl hóskandi evni hjá Løgtingsins Umboðsmanni at tikið støðu til. Ella kanska skuldi Býráðið enntá roynt málið í rættinum fyri at fáa endaliga staðfest, um bíðilistin var almennur.

Hann stúrir fyri, hvat verður tað næsta, nú bíðilistin við nøvnunum á teimum, sum hava søkt um grundstykki, er almannakunngjørdur.

– Kunnu vit nú vænta, at nøvnini á teimum, sum fáa sosialhjálp eisini verður kunngjørdur, ella hvat verður tað næsta, spyr hann.

### Fyri Býráðið

Leivur Hansen sigur, at hann nú hevur biðið um at fáa málið fyri á næsta býráðsfundi, sum verður í næstu viku.

– Sakkøn, eg havi tosað við, halda, at her er talan um privat viðurskifti, sum ikki koma undir lógina um alment innlit. Tey halda eisini, at tað er ein spurningur um hetta ikki eisini er brot á skrásetingarlógina .

Tí mælir hann til, at Býráðið ikki útflýggjar bíðilistan aftur, fyrrenn full greiða er fingin á, um hann veruliga kemur undir lógina um alment innlit.



# Náttarravnaløta hvørt leygarkvøld í vetur

**Hvørt leygarkvøld í vetur fer útvarpið at senda eina undirhaldssending. Vertirnir eru eisini kendir, men í løtuni vita teir ikki reiðiliga, hvat teir skulu kalla sendingina, hóast »Prosjekt leygarkvøld« fyrstu ferð fer í luftina um tvær vikur**

ÚTVARPSSENDING
*Heri á Rógvi*

Føroyski lurtaraskarin kann aftur í vetur gleða seg til hoyra nakrar kendar røddir hvørt leygarkvøld, tá tann »nýggja« undirhaldssendingin fer av bakkastokki um tvær vikur. Røddirnar eru sum áðurnevndu kendar. Tveir útvarpsvertir sita hvørt leygarkvøld í útvarpsstovuni frá kl. 22.10 til 01.00. Tó verður tað ikki teir somu tveir, sum fara at sita aftanfyri mikrofonina hvørja viku. Teir vera tríggir, ið fara at skifta um at sita í útvarpsstovuni. Talan er um teir tríggjar Heðin Arge, Rúna Jákupsson og Bjarna Mohr.



*Teir tríggir, f.v. Heðin, Bjarni og Rúni, fara í vetur at undirhalda føroyingum í Útvarpi Føroya hvørt leygarkvøld. So tey, sum dáma at sita uppi, fáa okkurt at leggja oyra til.*

*Mynd: Heri á Rògvi*

Allir tríggir hava royndir innan útvarpsarbeiði. Onkur teirra kann óivað eisini kalla seg bæði slóðbrótara og pioner innan undirhaldsøki í útvarpinum.

Hesir tríggir hava valt at fara undir at gera undirhaldssendingar hvørt leygarkvøld í vetur. Uppkastið til sendingarnar er framvegis í stoypiskeiðini, og tað eru heldur ikki teir mest tíðindafróðu menninir, sum vit hitta hetta hóskvøldið. Navnið á sendingini er framvegis ikki ásett, men teir tríggir eru allir klárir yvir hvat navn, tey flestu helst seta í samband við komandi sendingarnar.

### Playlist

Uppkastið til sendingarnar er higartil komið so mikið ávegis, at tað er fastlagt, at í útvarpsstovuni skulu tveir vertir sita hvørt leygarkvøld. Hin triðji kemur tó framvegis at vera knýttur at sendingunum í tann mun, at hann kemur at luttaka í fyrireikingunum til sendingina. Sum skilst, so krevja tílíkar sendingar sera nógva fyrireiking. Serliga eru tað tær so kendu spurnarkappingarnar, sum kunnu leingja um arbeiðsdagarnar. Og eitt slag av einari spurnarkapping verður eisini í sendingunum í vetur.

Hóast teir framvegis sita og tingast um hvussu og hvat í sambandi við komandi sendingarnar hjá teimum, so er tað tó fastlagt, hvat tímin eftir midnátt skal nýtast til.

Tað verður gjørdur ein sokallaður playlisti. Hesin góði listi fer at innihalda sangir, sum eru frammi í tíðini umframt klassikarar, sum gott kunna verða spældir einaferð enn. Sangirnir á listanum eru sjálvsagt valdir út av teimum trimum vertunum. Møguleiki verður so hjá lurtarunum at ynskja sær eitt lag av playlistanum, sum kemur at liggja frammi á heimasíðuni hjá útvarpinum, og listin fer eisini væntandi at innihalda heilt fitt av sangum. Lurtararnir kunnu ynskja sær eitt lag við at senda eitt teldubræv, men tað fer eisini at bera til at ringja inn og fáa varpa sína kvøðu beinleiðis kring oyggjarnar.

Teir tríggir ásanna, at hópin av sendingum eru, har fólk kunnu ringja ella skriva inn og ynskja sær eitt lag, men teir haldu tó, at tað er pláss fyri hesum tímanum hjá teimum.

Hetta við at lata fólk ringja ella skriva inn er eisini nakað, sum er roynt áður, eitt nú í spurnarkappingunum og Beatbox.

Tað eru lurtararnir sum eiga heiðurin av tílíkum táttum, sigur Heðin Arge.

### Heðin er boss

Við borðið hetta hóskvøldið sita teir tríggir Bjarni, 28, Heðin, 35, og Rúni, 27. Vit eru staddir í køkinum hjá Útvarpi Føroya.

Fyrsti spurningurin er sjálvandi, um hetta nú eru nýggjar Náttarravnasendingar. Spurningurin fær eina heldur misjavna móttøka, og svarið er eitt millumting millum ja og nei.

– Vit hava ikki givið sendingini nakað navn. Higartil arbeiða vit bara undir heitinum »Prosjekt leygarkvøld«, men hetta verður ikki eins og náttarravnasendingar, hóast hesar sendingarnar á sumum økjum sjálvandi fara at líkjast, sigur Rúni Jákupsson.

Allir tríggir vita væl, at fólk fara at seta hesar sendingarnar í samband við tær kendu náttarravnasendingar frá fyrr.

Tá prátið fer at snúgva seg um, hvør teirra hevur tað avgerðandi orðið, tá onkur træta stingur seg upp, so hyggja teir báðir, Bjarni og Rúni, beinanvegin at Heðini.

– Eg havi nú gjørt tílíkt í so nógv ár, at tað gevur mær eina ávísa magt, sigur Heðin Arge, og hinir báðir eru ikki ósamdir við honum.

Heðin byrjaði við at gera náttarravnasendingar leygarkvøld fyri átta árum síðani. Fyri trimum árum síðani kom Rúni uppí. Seinasta vetur, tá var tað Bjarni, sum saman við einum øðrum, skipaði fyri einari leygarkvøldssending.

– Tá vit byrjaðu uppá Náttarravnarnar, so rakti tað veruliga eitt turt stað, og havi eisini merkt ein ógvuliga stóran og breiðan lurtaraskara øll árini, sigur Heðin Arge.

Hvussu sendingin kemur at eita er framvegis ikki alment greitt, men mestir verður tað ein góður blandingur av ravnum og leygarkvøldssendingini.

# Fara at senda 110 tímar um vikuna



*Sendingarnar úr Múla eru millum sendingarnar á vetrarskrá útvarpsins*

**Útvarp Føroya fer nú undir vetrarskránna. Lurtararnir kunnu vænta sær eitt sindur av hvørjum henda komandi veturin**

SKRÁ
*Heri á Rògvi*

Útvarp Føroya fer nú undir sína vetrarskrá. Ætlanin er at senda 110 tímar um vikuna komandi vetur. Tá tað verður kaldari í veðrinum, so hava fólk kanska betri tókka til at lurta eftir útvarpinum, og í vetur bjóðar Útvarp Føroya lurtaranum eitt sindur av hvørjum.

Útvarp Føroya fer at senda longri út á kvøldi øll kvøld í vikuni. Mánadag til hósdag fer Útvarp Føroya at senda til kl. 23. Fríggjakvøld verður sent til kl. 24, leygarkvøld til kl. 01. og sunnudagar til kl. 22.

Nakrar sendingar, sum vanliga hvíla um veturin verður framvegis á skránni. Nógvar nýggjar sendingar eru eisini á skránni, eins og onkur kend sending kemur aftur á skránna.

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, sigur, at teir í vetur fara at senda rættiliga nógv. Tilfarið verður eisini rættiliga fjøllbroytt, sigur hann.

Av nýggjum sendingum kunnu nevnast Stýrivolt, sum stílar fyri. Tað flestu hugsa óivað um kortspæli, men talan er um eina mentunarsending. Eisini verður nakrar sunnudagar farið fram við ánni, har Jón Heðin Trondheim er úti í náttúruni.

Heldur ikki klaksvíkingarnir úr Studio Pegasus eru gloymdir í nýggju skránni. Teir fara m.a. at gera sendingina Heimabeitið. Eisini verða sendingarnar úr Múla sendar sunnukvøld í vetur.

